## Benzema ávegis til Madrid




Fyrst Kaká, síðan Cristiano Ronaldo og nú Karim Benzema. Um vit skulu hava álit á spanska blaðnum Marca, verður Benzema nýtt navn í leikarahópinum hjá Real Madrid í vikuni. Blaðið skrivar, at drúgvar samráðingar hava verið, og nú restar lítið í. Prísurin fyri franska framherjan verður um 260 milliónir krónur.

## Straka fekk ein venjingardyst

Frantisek Straka er ikki longur landsliðsvenjari í Kekkia. Hann var í gjár sagdur úr starvi. Straka setti seg í venjarasessin fyri bara tveimum mánaðum síðan, men nú greiddi nývaldi forsetin í kekkia fótbóltssambandinum, Ivan Hasek, frá, at hann ikki hevði álit á venjaranum. Straka stóð á odda fyri kekkiska landsliðnum í einum venjingardysti móti Malta.

# Skutu seg sjálvar í fótin




**Jógvan Niclasen setti 30 av 36 pílum í sentrum, tá skotið varð á 30 metrum. Men tað rakk akkurát ikki, tá Billie Finney av Hetlandi samanlagt hevði eitt stig meira enn Jógvan**

Mynd: Álvur Haraldsen

**Í úti við fýra tímar bíðaðu bogaskjúttarnar á Álandi eftir úrslitum sínum. Fýra tímar, har gull, silvur og bronsa fleiri ferðir skiftu hendir**




Jákup Mørk

Tá endin er góður er alt gott, verður ofta sagt. Og um so er, so varð talan um ein bogaskjótidag av teimum heilt góðu, við trimum gullmerkjum, tveimum úr silvuri og einum úr bronsu sum úrtøku.

Men áðrenn metallið kom til høldar, máttu føroysku skjúttarnir ígjøgnum so øgiliga nógv.

### Óskil í roknskapinum

Tað vísti seg, at tað var telduskipanin hjá fyrireikarunum, sum var trupulleikin.

- Vit fingu boð frá IAG um at nýta eina nýggja skipan, men hon hevur altso ikki víst seg at rigga nóg væl. Sjálvt um hon helst skuldi gjørt alt lættari. Áður hava vit bara brúkt vanlig rokniørk, og tað tekur altso ikki so langa tíð at tasta alt inn. Skjóta vit heima í Føroyum, eru vit kanska einir 30 skjúttar, og tá tekur tað altso ikki meira enn hálvan tíma ella so, áðrenn hesi hava fingið skorikort sendandi við telduposti. So hetta er altso ikki nóg gott, staðfesti Schandorff Vang, sum í ár er ein av dómarunum. Og – kunnu vit leggja afturat – ikki hevur nakað við sjálva samanteljingina at gera.

Og hvør sum ein kunu skjúttarnir helst skriva undir uppá, at hetta var ikki nóg gott. Eingin tordi at trúgva nøkrum sum helst á stigatalvuni. Onkur skjútti hevði mist upp til 150 stig í mun til rætta stigatalið, meðan onnur kanska høvdu fingið nøkur stig afturat í sínum roknskapi.

Ætlandi skuldu heiðursmerkini handast klokkan 16 lokala tíð, men klokkan var farin beint um 18, áðrenn pallurin endaliga kundi gerast klárur.

Og tá alt kom til alt, so var úrtøkan ikki so galin. Gull til Anniku Vang, sum skeyt nýtt Oyggjaleikamet á bæði 50 og 30 metrum. Gull til liðini í bæði compound og recurve. Silvur til Jógvan Niclasen og Sigrid Vang og bronsu til Absalon Hansen.




**Føroysku skjúttarnir gjørdu sítt, men tað gekk meira enn striltið at fáa løn fyri stríðið, tá dómararnir høvdu meira enn ilt við at halda skil á stigunum**

Mynd: Álvur Haraldsen

## BOGASKJÓTING, FITA-UMFAR

**Recurve, menn**

| | 90 m | 70 m | 50 m | 30 m | Íalt | pláss |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Absalon Hansen | 255 | 297 | 277 | 331 | 1160 | 4 |
| Hans Petur Højgaard | 246 | 296 | 270 | 307 | 1119 | 7 |
| Eirikur í Jákupsstovu | 240 | 254 | 273 | 328 | 1095 | 9 |
| Jógvan Magnus Andreasen | 201 | 263 | 288 | 307 | 1059 | 14 |

**Recurve, kvinnur**

| | 70 m | 60 m | 50 m | 30 m | Íalt | pláss |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Annika Vang | 253 | 280 | 288 | 332 | 1153 | 1 |
| Jastrid Mathea R. Jensen | 165 | 209 | 210 | 290 | 874 | 12 |

(Annika Vant setti nýtt Oyggjaleikamet á 50 og 30 metrum)

**Compound, menn**

| | 90 m | 70 m | 50 m | 30 m | Íalt | pláss |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Jógvan Niclasen | 316 | 328 | 337 | 354 | 1335 | 2 |
| Albert Elias Dam | 300 | 326 | 333 | 349 | 1308 | 5 |
| Magnus Andreasen | 299 | 319 | 325 | 349 | 1292 | 7 |
| Hans Asbjørn Eysturdal | 293 | 320 | 321 | 338 | 1272 | 14 |

(Jógvan Niclasen setti nýtt oyggjaleikamet á 30 metrum)

**Compound kvinnur**

| | 90 m | 70 m | 50 m | 30 m | Íalt | pláss |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Sigrid K. Vang | 308 | 317 | 300 | 339 | 1264 | 2 |
| Rakul Dam | 296 | 301 | 301 | 333 | 1231 | 5 |

**Liðskjótingin**

| | Íalt | pláss |
|---|---|---|
| Recurve | 3432 | 1 |
| Compound | 3907 | 1 |